Sørvágs Kommuna

Hesir listar eru innkomnir til kommunuvali› í Sørvági 21.11.00, og gó›kendir av valnevndini

Listi A
1. Dora Hansen, húsmó›ir, Sørvágur
2. Eivin Helgi Jacobsen, brand- & arbei›slei›ari, Sørvágur
3. Holgar Jacobsen, timburma›ur, Sørvágur
4. Jákup Sune Lauritsen, byggifrø›ingur, Sørvágur
5. Helgi Mouritsen, arbei›sforma›ur, Sørvágur
6. Rasmus Mouritsen, arbei›sma›ur, Sørvágur
7. Kristian Olsen, lastbilførari, Sørvágur
8. Ivan Simonsen, sparikassama›ur, Sørvágur

Stillarar:
Petur Kruse, lærari, Sørvágur
Sune Jacobsen, lærari, Sørvágur
Niclas Lauritsen, timburmeistari, Sørvágur
Sólva Hansen, afis operatør, Sørvágur
Wenningsted Jacobsen, sjómansskúlanæmingur, Sørvágur
Arnjohn Hvítklett, skrivstovuma›ur, Sørvágur
Asbjørg Weihe, bor›rei›slukona, Sørvágur
Regin Jespersen, løgregluma›ur, Sørvágur
Sveinbjørn Mouritsen, brand- og arbei›slei›ari, Sørvágur
Kalle Soll, arbei›sma›ur, Sørvágur
Sigrid Henriksen, skrivstovukona, Sørvágur
Poula Davidsen, krambakona, Sørvágur
Elian á Ørg, maskinsmi›ur, Sørvágur
Eivin Ole-Jacobsen, arbei›sforma›ur, Sørvágur
Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur, Sørvágur
Leivur Steintún, maskinmeistari, Sørvágur
Lis Olsen, køksarbei›ari, Sørvágur
Zakaria Samuelsen, hárfrí›kanarkona, Sørvágur
Richard Leonsson, avgrei›sluma›ur, Sørvágur
Edna Niclasen, reinger›arkona, Sørvágur

Listi B
1. Sólvá Thomassen, handilskvinna, Sørvágur
2. Laila F. Simonsen, dagrøktarlei›ari, Sørvágur
3. Randi Zachariasen, krambakvinna, Sørvágur
4. Eydna Poulsen, landpostbo›, Sørvágur
5. Herborg Lauritsen, dagrøktarmamma, Sørvágur
6. Anita Gó›adal, reinger›arkona, Sørvágur
7. Poula Davidsen, krambakvinna, Sørvágur
8. Andrias Berglí›, arbei›sma›ur, Sørvágur
9. John Lauritsen, bygningssnikkari, Sørvágur

Stillarar:
Tummas Heri Thomassen, maskinama›ur, Sørvágur
Ranvá Magnussen, sjúkrasystir, Sørvágur
Jana T. Egholm, krambakvinna, Sørvágur
Elisa Hansen, krambakvinna, Sørvágur
Kára Lauritsen, handilskvinna, Sørvágur
Sanna H. Haraldsen, vaskikona, Sørvágur
Marna Selfoss, stu›ul, Sørvágur
Betina T. Egholm, stu›ul, Sørvágur
Herborg Davidsen, pensionist, Sørvágur
Amy Jacobsen, køkshjálp, Sørvágur
Anna Gudmundsen, pensionist, Sørvágur
Astrid Berglí›, klinikassistent, Sørvágur
Ole Anderson, snikkari, Sørvágur
Jastrid Hansen, pensionist, Sørvágur
Astrid Lauritsen, køkshjálp, Sørvágur
Birgir Lauritsen, arbei›sma›ur, Sørvágur
Atli Nolsøe, sjóma›ur, Sørvágur
Jim Sonni Guttesen, sjóma›ur, Sørvágur
Edvin Thomassen, pensionist, Sørvágur

Listi C
1. Eiley H. Weihe, postbo›, Sørvágur
2. Berg L. Rasmussen, snikkari, Sørvágur
3. Thordis Skaalum, sjúkrahjálpari, Sørvágur
4. Valdemar Simonsen, bakari, Sørvágur
5. Elida Falkvard, sunnheitshjálpari, Sørvágur
6. Erik Davidsen, bankama›ur, Sørvágur
7. Oddmar Selfoss, arbei›sma›ur, Sørvágur
8. Herálvur Jacobsen, lærari, Sørvágur
9. Elisabeth Falkvard, sjúkrahjálpari, Sørvágur

Stillarar
Laurits Weihe, arbei›sma›ur, Sørvágur
Ásbjørg Davidsen, reinger›arkvinna, Sørvágur
Høgni Davidsen, sjóma›ur, Sørvágur
Jóannes Henriksen, maskinma›ur, Sørvágur
Birgir Hansen, útró›rarma›ur, Sørvágur
Linda Lauritsen, optikari, Sørvágur
Eilif Weihe, skrivstovuma›ur, Sørvágur
Malmberg Simonsen, pensionistur, Sørvágur
Herborg Simonsen, pensionistur, Sørvágur
Vilborg Davidsen, húsmó›ir, Sørvágur
Sólger› Niclasen, sosial- og sunnh. hjálpari, Sørvágur
Steingrím Samuelsen, skipsførari, Sørvágur
Randi Petersen, sosial- og sunnh. ass., Sørvágur
Pauli Bo Petersen, skipsførari, Sørvágur
Torfinn Davidsen, næmingur, Sørvágur
Fró›i Nolsøe, sjóma›ur, Sørvágur
Sigurd Jan Tavsen, smi›jumeistari, Sørvágur
Heini Davidsen, goymsluma›ur, Sørvágur
Arnger› Davidsen, flogterna, Sørvágur

Sørvágur, tann 31.10.00
Oddur Petersen, forma›ur

Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 5. november kl. 15.30 heldur Niels J. Arge, klokkari í Klaksvík fyrilestur í kirkjukjallaranum í Frí›rikskirkjuni á Toftum um evni›: Klokkaratænastan.

FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR
Postboks 1121 · tlf. +298 321132
+298 321761 · FO-110 Tórshavn

PATRÓNIR
Til hann ið setur krøv til dygd og trygd
Vit hava tær heims-kendu Eley patrónirnar á goymslu
Sosialurin - 311820
Náttúrudeildin
P/i Thomas Dam á Hálsi
Heykavegur 3 • 100 Tórshavn
Tel. 311400 • Fax 315574
th-dam@post.olivant.fo

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

Stjórnin til rei›ar at samrá›ast

Poul Nyrup Rasmussen er til rei›ar at samrá›ast um eitt n‡tt samrá›ingarupplegg frá landsst‡rinum, og hann bí›ar nú eftir einari áheitan frá løgmanni

Magnus Dam
Keypmannahavn

Tey høvdu skund á skrivstovuni hjá Ríkisumbo›num á middegi t‡sdagin. Útvarpi› hev›i júst bori› tí›indini frá løgmanni um, at landsst‡ri› hevur slept fullveldisætlanini, og hesi tí›indini skuldu skjótast gjørligt ni›ur til danska forsætisrá›harran.

Ein gó›an tíma seinni møtti Poul Nyrup Rasmussen upp í fundarhølinum hjá 21-mannanevndini hjá Fólkatinginum, har hann millum anna› kundi grei›a nevndini frá tí›indunum, sum Útvarpi› júst hev›i bori› umframt samrá›ingunum hósdagin.

Eftir fundin seg›i forsætisrá›harrin, at hann hevur tiki› or›ini hjá løgmanni til eftirtektar, og at hann skilir stø›una solei›is, at landsst‡ri› nú arbei›ir vi› einari n‡ggjari loysn, sum í fyrsta umfari í øllum førum liggur innanfyri ríkisfelagsskapin.

– Eg bí›i nú eftir einum n‡ggjum útspæli› frá landsst‡rinum. Og vit eru til rei›ar at samrá›ast um ta› útspæli›, eins og vit higartil hava samrá›st um fullveldismáli›, seg›i hann.

– Vit hava sagt alla tí›ina, at vit helst vilja hava Føroyar í ríkisfelagsskapinum, men hinvegin hava vit eisini sagt, at hetta er ein spurningur, sum føroyska fólki› avger.

– Eg haldi, hetta máli› hevur so stóran t‡dning, at vit mugu bí›a eftir einum n‡ggjum útspæli› frá landsst‡rinum. Eg vil ikki leggja meg út í or›askifti› í Føroyum, og landsst‡ri› og løgtingi› mugu nú sleppa at arbei›a vi› sínari ætlan í fri›i og ná›um, seg›i forsætisrá›harrin.

ítróttur

Nr. 211 • hósdagur • 2. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Hevndarstund

VÍF vil hava hevnd, tá Neistin hóskvøldi› kemur til Vestmanna, har fremstu li›ini hjá feløgunum bá›um bresta saman

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tveir dystir ver›a leiktir í fremstu hondbóltsrø›unum í kvøld, og ver›a teir bá›ir í Vestmanna.

Talan er um besta kvinnu- og mansli›i› hjá Neistanum, sum vitjar, og á heimali›unum munnu tey ikki vera í iva um, at tey eiga hevnd til gó›ar.

Seinast li›ini hittust, var nevnliga seinasta leikumfari› í vár, og gjørdist úrsliti› tá, at neistamenn tryggja›ur sær meistaraheiti›, eftir at VÍF annars hev›i átt oddasessin meginpartin av kappingarárinum. Harumframt syrgdu bláklæddu kvinnurnar eisini fyri, at tær hjá VÍf vór›u skumpa›ar út í gloymskuna, eftir at tær so at siga alt kappingarári› høvdu havt hei›ursmerki í eygsjón.

Sakna tvær

Hjá monnunum er einki at ivast í, at VÍF er favorittur. Neistamenn hava als ikki somu styrki, sum teir høvdu í fjør, me›an vestmenningar tykjast púra einará›andi.

Hjá kvinnunum er VÍF eisini favorittur, men partvíst byggir favorittheiti› á, at Neistin noy›ist at vera tveir leikarar fyri uttan, sum tær fegnar vildu havt tøkar.

Bjørg Patursson fekk eitt fullkomuliga láturligt reytt kort, tá Neistin um vikuskifti› vann á Tjaldrinum, og noy›ist hon tí at sita leikbann av sær.

Heldur ikki er Inga Danberg tøk, orsaka› av at hon í oktober mána›i leikti ein dyst vi› íslendska ÍBV, har hon royndarvandi.

Ivasamar reglur

Einki er at siga til, at tey í Neistanum i›ra seg um hetta. Tey mundu annars halda, at alt var í lagi, tí grein 4.5 í reglunum hjá HSF, Flyting millum útland og Føroyar, nevnir einki um, at leikari skal bí›a í 30 dagar.

Hetta er annars galdandi, tá leikari skiftur millum føroysk feløg smb. grein 4.1, men 4.5 nevnir so einki um hetta. Kortini hevur HSF av prinsipiellum ávum gjørt av, at hetta eisini skal vera galdandi í slíkum førum, og neyvan er meira, sum Neistin fær gjørt vi› ta›.

Aftur her tykist sostatt at vera ivamál um, hvørjar reglur eru galdandi á hondbóltsøkinum, so einki er at ivast í, at a›alfundurin komandi hevur okkurt at taka stø›u til.



Hóast ta› ikki stendur beinlei›is í hondbóltsreglunum, so er Inga Danberg leikbanna› fram til 7. november

FK-Kapping hjá teimum yngru

Um vikuskifti › ver›ur FK-kappingin hjá yngru deildunum í Havn

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Eins og vanligt, so skipar flogbóltsfelagi›, Fleyr, aftur í ár fyri FK-kapping hjá teimum yngru.

Kappingin ver›ur komandi vikuskifti, og ver›ur sagt frá Fleyr, at 88 li› hava bo›a› frá luttøku. 32 dreingja- og 56 gentuli›.

Av tí at somiki› nógv li› hava bo›a› frá luttøku, er gjørt av, at byrja› ver›ur longu fríggjakvøldi›, tá kvinnu- og mansunglingar saman vi› gentum 16 ár skulu royna seg.

Alt vikuskifti› fara børn og ung at kappast í árligu FK-kappingini hjá Fleyr

Súkklukapping

Seinasta súkklukappingin á árinum ver›ur nú fyriskipa› av Tórshavnar Súkklufelag. Hetta er 17. kappingin, sum felagi› skipar fyri í ár

SÚKKLING
Tí›indaskriv

Tá komandi súkklukappingin er lokin, hevur Tórshavnar Súkklufelag skipa› fyri ikki færri enn 17. kappingum hetta ári›

Nú ári› fer at halla, skipar Tórshavnar Súkklufelag, stytt TSF, fyri seinastu súkklukappingini í ár. Henda kapping kemur í sta›in fyri barnasúkklukappingina Balslev Runt, sum orsaka av um/útbygging er útsett til várs, einafer› í mai mána›i.

Árliga Kappingin Balslev Runt ver›ur so aftur á skránni í sept 2001, altso tvær súkklukappingar hjá Balslev næsta ár Ta› eru súkklarar frá TSF i› hjálpa manningini hjá Balslev vi› kappingini, og eru ta› eisini teir i› skipa hesari kappingini.

Ætlanin er ikki, at kappingin skal koma ísta›in fyri Blaslev Runt, heldur skal hon roknast sum plástur á sári› me›an bí›a› ver›ur. Hetta ver›ur ein sokalla› multikapping, har børn, unglingar og vaksin súkkla sama tein, tó solei›is, at tey eldru súkkla teinin oftari. Ta› at allir aldursbólkar súkkla í einum, kann bara lata seg gera tá talan er um tí›arkoyring, tí tá eru ikki so nógvir súkklarar á vegnum í senn. Súkkla› ver›ur eftir vegnum fram vi› Strond, frá Føroya Sparikassa til tyrlupallin og aftur. Kappast ver›ur um hvør súkklar teinin skjótast, og byrja súkklararnir vi› 1 minutti ímillum. Ikki er ney›ugt hjá bólki 1 og 2 at hava kappkoyringarsúkklu, vanlig fjallasúkkla ella líknandi er í lagi. Súkklararnir eru b‡ttir í bólkar eftir aldri:

1. Bólkur 1: Børn 9 ár og yngri.
2. Bólkur 2: Børn 10-14 ár.
3. Bólkur 3: Unglingar 15-18 ár.
4. Bólkur 4: Vaksin.

Kappingin byrjar kl. 15.00, og ver›ur tilmeldingin á startmálinum frammanfyri Føroya Sparikassa(Gamli Fiskasølubygningurin) kl. 14.30. Tá kappingin er li›ug, ver›a hei›ursmerki handa› vinnarunum, og øll børnini i› hava súkkla›, fáa sodavatn, og eru ta› Balslevs Timburhandil og Coca Cola, i› stu›la súkklufelagnum vi› hesum.

Telja vit hesa kappingina vi›, so hevur Tórshavnar Súkklufelag í ár skipa fyri ikki færri enn 17 súkklukappingum, og so væl hevur vi›ra›, at bara í seinastu kappingini leygardagin 21 okt., sum var ein 50 km. tí›arsúkkling úr Kollafjør›i til Ljósáir og aftur, blivu súkklararnir vátir. Tá var eittans æli›, og ta› køldi súkklararnar av í Hósvík. Bara fimm súkklarar vóru vi› í kappingini, ein gavst vegna teknist brek, og komu hinir á mál í hesari ra›fylgju:

1. Gunnar Dahl Olsen. 1.29.34
2. Evald Rasmussen 1.35.34
3. Kári Simonsen 1.41.15
4. Christian Niclasen 1.51.00